norden

Nordisk Ministerråd

# Leiðin til minni rusk

**NÆMINGAHEFTI**



## INNIHALD

## AT FYRIBYRGJA BURTURKASTI

**UPPGÁVA 1** Tilfeingi til eitt glas **6**
**UPPGÁVA 2** Hvussu minka vit um burturkast? **10**

## KLÆÐI

**UPPGÁVA 3** Hvussu verður ein T-shirt gjørd? **16**
**UPPGÁVA 4** Hvussu fáast klæði at halda longur? **19**
**UPPGÁVA 5** Finn upp á eina verkætlan **21**

## MATUR

**UPPGÁVA 6** Hví tveita vit mat burtur? **26**
**UPPGÁVA 7** Hvussu nógvur matur verður tveittur burtur í matvøruhandlinum? **28**

## ELEKTRONIKKUR

**UPPGÁVA 8** Kanna, hvat tilfar verður brúkt til elektronikk, og hvat verður gjørt við tað eftir brúk **34**
**UPPGÁVA 9** Hvussu kunnu vit minka um burturkast, tá ið vit brúka elektronikk? **38**

## HEY

Hevur tú hugsað um, hvat tú blakar í ruskspannina? Og hvussu nógv burturkast heldur tú, at tað verður til eftir einum ári?

Um vit rokna við, at vit tveita umleið 1,4 kg í ruskspannina um dagin, og 365 dagar eru í einum ári, kunnu vit rokna út, at eitt fólk elvir til umleið 500 kg av burturkasti um árið. Tað verður til nógv burturkast samanlagt, um vit eru nógv fólk, t.d. ein heilur skúlaflokkur.

Kundi okkurt av tí verið brúkt umaftur, ella kanska til okkurt annað?

Í hesum hefti eru mong spennandi verkevni, ið snúgva seg um, hvussu vit kunnu minka um burturkastið frá klæðum, mati og elektronikki.

Góðan arbeiðshug!

*Norðurlendska Ráðharraráðið*

# AT FYRIBYRGJA BURTURKASTI

**UPPGÁVA 1**

**UPPGÁVA 2**

# UPPGÁVA 1

## TILFEINGI TIL EITT GLAS

### INNGANGUR

Tá ið vit keypa eitt glas av súltutoyi, er okkurt tilfeingi brúkt til súltutoyið. Men ymsi tilfeingi eru eisini brúkt til glasið, sum súltutoyið er í.

Tilfeingi er tað tilfar, ið brúkt verður til at gera ymsar lutir. Tilfeingi av ymsum slagi er brúkt til allar lutirnar, tit hava kring tykkum.

Næstan alt tilfeingi fæst úr jørðini. Sumt tilfeingi kann koma aftur – til dømis ber til at planta rabarbur, so at vit fáa nýggjar rabarbur at kóka súltutoy burturúr.

Men annað tilfeingi er, sum ikki ber til at gera av nýggjum. Hetta er eitt nú galdandi fyri sandin, ið verður nýttur til at gera glas, og tað metalið, ið brúkt verður til at gera lokið til eitt súltutoysglas.

### VERKEVNI

Kanna t.d. eitt brúkt súltutoysglas við loki. Hygg nú nærri eftir, hvat tilfar er brúkt.

**Tosa í bólki um:**

Hvønn eginleika hava ymsu partarnir á lutinum? Eru teir til dømis harðir, bleytir, gjøgnumskygdir, haldførir, vatntættir, lufttættir, góðir at prenta á, góðir at seta á, góðir at fáa av?

- Hví man júst hetta slag av tilfari vera brúkt til hvønn einstakan partin?
- Kundi annað tilfar verið nýtt?
- Hví halda tit, at júst hetta tilfarið er brúkt?
- Hvussu halda tit, at glasið og alt pakkitilfarið skal hóska til tað, sum hevur verið í glasinum?
- Hvat er týdningarmikið fyri tann, sum framleiðir vøruna?
- Hvat er týdningarmikið fyri sølubúðina, ið skal selja vøruna?
- Hvat heldur tú vera týdningarmikið, tá ið tú skalt velja millum somu vørur, men bara ymiskt innpakkaðar?
- Fá greiðu á, hvaðani tilfarið til einstøku partarnar av glasi og loki kemur.

Kanna, um tað kann verða endurnýtt. Brýt tilfarið sundur í tveir bólkar: Tað, sum kann brúkast umaftur, og tað, sum ikki kann brúkast umaftur.

Hugsa eisini um, hvat annað tilfeingi man hava verið brúkt, so at glas og lok kundu verða framleidd.

Í gomlum døgum vildu nógv goyma slík gløs og brúka tey til súltutoy ella annað, sum tey sjálv gjørdu í køkinum.

- Hví er kanska ikki so longur?
- Hvat gera tit heima hjá tykkum við slík gløs?

# BRÚKA OG BLAKA BURTUR MENTAN




**Tosið í flokkinum um:**

> Hvat er eftir tykkara tykki gott at brúka til súltutoy, til sild o.s.fr.?
> Hava tit nøkur hugskot til, hvussu vit kunnu endurnýta gomul gløs betur?
> Hvat halda tit vera týdningarmikið at hava í huga, um mongdin av gløsum er vaksandi?
> Kunnu tey, sum framleiða, gera nakað fyri at verja umhvørvið, tá ið slíkar vørur verða framleiddar?
> Kunnu vit, sum keypa slíkar vørur, gera nakað fyri, at trupulleikar ikki standast av teimum?

Hava tit nøkur hugskot til, hvussu burturkast kann gerast tilfeingi til nýggjar lutir? – Tit kunnu byrja við at hugsa um tey gløs, tit hava kannað.

## VISTI TÚ

Halda vit fram at brúka nógv og blaka í ruskspannina, so verður meiri av ruski. Bæði her, men eisini har, ið vøran verður framleidd.

## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

Hjá nógvum er tað vorðið ein vani og tí eisini ein lívsstílur at keypa nýtt og at brúka nógv. Hetta rópa vit 'brúka og blaka burtur' mentan.

# BURÐARDYGG NÝTSLA




## VISTI TÚ

Burðardygd merkir millum annað:

> at vit spara vatn og orku

> at vit fáa sum minst av ruski

> at vit skaða náttúru og umhvørvi so lítið, sum til ber

## VISTI TÚ

At í 333 bakkum til livurpostei er nóg mikið aluminium til eina heila súkklu.

## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

Nógv av tí, vit blaka burtur, kann verða brúkt aftur.

## RÁEVNI

Ráevni eru natúrvørur, sum vit brúka til at gera lutir og mat.

Ráevni eru eisini tilfeingi.

Vit brúka ráevni til at gera ymsar vørur.  Til dømis verður olja nýtt til at gera plast.

Mong ráevni verða ikki endurnýggjað. Olja tekur t.d. milliónir ár at verða til.

## TILFEINGI

Tilfeingi er nøgdin av tilfari og øllum teim ráevnum, ið eru tøk, og sum kunnu gagnnýtast. Tilfeingi kann tí vera ráevni, men tilfeingi kann eisini vera til dømis træ ella burturkast, um so er, at vit kunnu brúka tað aftur.

Eitt tilfeingi, vit kunnu endurnýta, er til dømis glas, ið vit tveita í bingjuna til glasburturkast. Tí úr glasinum kunnu vit gera nýggj gløs og fløskur.

Sandur er ráevni. Sandur verður brúktur til at gera glas.

## VISTI TÚ

Um vit halda fram at brúka nógv og blaka burtur, so verður nøgdin av ruski størri.

Ikki bara her hjá okkum, men eisini har, ið vøran verður framleidd.

| AT GERA | KOSTAR Í TILFEINGISNÝTSLU |
|---|---|
| eina T-shirt | 3 kg |
| einar kovboybuksur | 7 kg |
| einar leðurskógvar | 31 kg |
| eina súkklu | 380 kg |
| eina farteldu | 442 kg |
| ein DVD-spælara | 1714 kg |
| eitt køli- og frystiskáp í einum | 2159 kg |
| eitt sjónvarp | uml. 2500 kg |

# UPPGÁVA 2

## HVUSSU MINKA VIT UM BURTURKAST?

### INNGANGUR

Hóast vit royna sum best at savna og viðgera burturkastið, so dálkar tað umhvørvið. Tí hevði sjálvandi verið best, um vit kundu sloppið undan burturkastinum.

Í dag verður nógv tosað um at sleppa undan burturkasti. Eitt dømi um hetta er at keypa brúkt klæði, sum er eitt slag av klædnaendurnýtslu.

### VERKEVNI

Kanna eftir, hvat tit sum heild tveita burtur heima. Hvat tveita foreldur tíni burtur? Hvat tveitir tú burtur?

Tú kanst eisini ímynda tær, hvat fólk aðrastaðni í heiminum tveita í ruskspannina.

Hygg at hesi strikumyndini um gongdina í fólkatalinum á jørðini.



Í dag eru vit umleið 7 milliardir, t.e. 7.000.000.000 fólk á jørðini.

Hvussu nógv ár eru liðin, síðani fólkatalið í heiminum var 3, 5 milliardir, t.e. helmingurin av tí, tað er nú?

Tá ið vit hugsa um okkara egnu nýtslu og burturkast í Føroyum og í Norðurlondum, er skilagott eisini at hugsa um restina av heiminum.

Hvussu halda tit, at tað fer at ávirka nøgdina av burturkasti, at fólkatalið á jørðini veksur?

Øll menniskju hava tørv á mati, bústaði, útbúgving og heilsuhjálp.

Men fólk halda eisini, at tey hava tørv á øðrum, tá ið tey hava ráð til tess.

Hugsa um ein lut, sum mong fólk í heiminum kundu hugsað sær at átt - tit hava hann kanska longu sjálv?

Vel ein lut og tekna hann, frá tí, at hann verður framleiddur, til hann verður brúktur. – Met um:

> Hvussu verður hann framleiddur?
> Hvørji ráevni og hvat tilfar verða nýtt til at framleiða hann?
> Hvat tilfar man vera fingið til vega úr øðrum londum?
> Hvaðani kemur burturkast í hesum førinum?

Kanna, hvussu burturkast kundi verið fyribyrgt í sambandi við lutin, sum tú hevur valt.

Tit kunnu hyggja í 'visti tú' teigin á næstu síðu at síggja eitt dømi um ein lut, nevniliga eina fartelefon.

Vit verða enn fleiri menniskju á jørðini í framtíðini.

Hvat hugsa tit um møguleikarnar fyri at halda fram at brúka og blaka burtur, bæði í Føroyum, Norðurlondum og í restini av heiminum?

## TÁ IÐ VØRUR SLÓÐA

Ein vøra kann á ymsan hátt leggja slóð eftir seg.

Tá ið borað verður eftir olju á landi, til dømis í Peru, so verða regnskógir oyddir, og jørðin verður dálkað við nógvum ymsum evnum.

Tá ið plast verður framleitt, brúka maskinurnar brennievni. Brennievni dálkar luftina við $CO_2$.

Tá ið tilfeingi og lidnar vørur verða fluttar til Føroya, verður brennievni eisini nýtt.







## VISTI TÚ

$CO_2$ er eitt vakstrarhúsgass. Tí er $CO_2$-útlát ein orsøk til, at tað verður heitari á jørðini.

Trø 'eta' $CO_2$ og hjálpa tí til at forða upphitingini.




## VISTI TÚ

> Umleið 75 kg av tilfeingi skulu til at gera eina fartelefon.  Nógv verður til burturkast, áðrenn telefonin er liðug.
> At gera eina fartelefon krevur 56% av plasti, 25% av metali og 16% av keramikki. Tey síðstu 3%'ini eru ymsi sløg av kemiskum evnum og eitt sindur av glasi.
> Plast verður gjørt úr olju
> Keramikk verður gjørt úr leiri
> Glas verður gjørt úr sandi o.ø.
> Metal kemur úr námum ymsastaðni í heiminum

# KLÆÐI

UPPGÁVA 3

UPPGÁVA 4

UPPGÁVA 5

# UPPGÁVA 3

## HVUSSU VERÐUR EIN T-SHIRT GJØRD?

### INNGANGUR

Tá ið tú keypir eina T-shirt, hevur hon longu verið á langari ferð og hevur brúkt nógv tilfeingi. Kanska er bummullin, sum T-shirtin er gjørd úr, vaksin í Afrika, spunnin og blivin til tráð í Póllandi, bundin í Russlandi, litað í India, seymað í Kina og pakkað í Oslo, áðrenn hon verður seld í tínum klædnahandli. Í roynd og veru kann ein T-shirt ferðast fleiri ferðir um jørðina frá tí, at hon byrjar sum bummull í akrinum, til hon liggur liðug í handlinum í einum øðrum landi.

### VERKEVNI

Hvar er tín T-shirt gjørd, og hvussu er hon gjørd?

Tekna ferðina hjá tínari T-shirt og greið flokkinum frá, hvar hon møguliga hevur steðgað á leiðini og hví.

Ger ein lista við tí, ið T-shirtin hjá tær er gjørd úr (hugsa eisini um tey evni, sum ikki standa á merkinum – tað kann vera liturin, sum er brúktur at lita T-shirtina við ella ein prentað mynd).

Hvat, metir tú, krevur mest orku í livitíðini hjá eini T-shirt? – Er tað, tá ið bummullin verður heystað, tá ið T-shirtin verður seymað ella litað, ella eru tað allar tær ferðirnar, tá ið hon verður vaskað og kanska eisini turkað í turkitrumlu heima við hús?

Hvat gert tú vanliga við eina T-shirt, sum tú ikki longur brúkar? Eru aðrir møguleikar?

Kanst tú við tínari klædnanýtslu vera við til at minka um nøgdina av burturkasti?

### VISTI TÚ

Toy og pløgg verða gjørd bæði úr **natúrtrevjum** og **eftirgjørdum trevjum.**

**Natúrtrevjur** fáast úr plantum (bummull, hampi, bambusi, lín, soyu) og djórum (seyði, silkiormum, alpaka, t.e. eitt slag av suðuramerikanskari lamu).

**Eftirgjørdar trevjur** verða gjørdar úr olju, sum verður til polyester, akryl, lycra o.a.

### VISTI TÚ

Upp til 29.000 litrar av vatni fara til at gera 1 kg av bummull. Fyri hvørt kg av bummull verða 15 kg av vakstrarhúsgassum útleidd.

# AT GERA KLÆÐI ÚR BUMMULL




## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

> Óslitin klæði kunnu vara longur, um vit lata tey víðari til vinfólk, ella vit lata tey inn til eina klædnabingju, tá ið vit sjálv eru liðug at brúka tey.

> Klæðini halda eisini longur, um vit ikki vaska tey, fyrr enn tey eru skitin – og ikki bert, tí vit hava verið í teimum í ein hálvan dag og vilja skifta klæði.

> Tá ið vit skulu hava nýggj klæði, kunnu vit gáa eftir umhvørvismerkjum sum Blóman ella Svanurin. Er eitt av hesum umhvørvismerkjum á klæðunum, eru vit við til at minka um nýtsluna av eitrandi evnum.

# AT GERA KLÆÐI ÚR EFTIRGJØRDUM TILFARI




## VISTI TÚ

> Eftirgjørdar trevjur verða gjørdar úr ráolju og natúrgassi; og henda framleiðslan brúkar nógva orku.

> Tá ið eftirgjørdar trevjur verða evnaðar til, verður plast trýst ígjøgnum ein form, sum ger træðrirnar

> Tá ið trevjurnar verða gjørdar, verða kemisk evni nýtt, sum kunnu elva til skaða á bæði umhvørvi og heilsu.

> Nógvar klædnavørur eru gjørdar úr einum blandi av ymsum eftirgjørdum trevjum ella úr eftirgjørdum og natúrtrevjum.

> Tað vanligasta er ein blandingur av 65% av bummull og 35% av polyester. Lesið nú merkini á klæðum tykkara.

# UPPGÁVA 4

## HVUSSU FÁAST KLÆÐI AT HALDA LONGUR?

**INNGANGUR**

Tit hava kanska klæði heima, sum tit ikki brúka longur. Heldur enn at tveita tey burtur, kunnu tit savna saman brúkt klæði og umhugsa, hvat ber til at gera, fyri at klæðini kunnu halda longur. Tit kunnu kanska sjálv fáa onnur spennandi klæði, uttan at tað kostar pening ella tilfeingi.

Hygg at myndunum á síðu 18 og 20. Kanska tit fáa hugskot til, hvat kann verða gjørt.

**VERKEVNI**

Tosa við floksfelagarnar um, hvussu tit kunnu geva gomlum klæðum nýtt lív.

Hvat kundu tit gjørt við brúkt klæði?

Hvussu ávirkar tað umhvørvið, um vit í størri mun endurnýta klæði?

Hvørjir fyrimunir og vansar kunnu verða fyri tykkum sjálv, um tit endurnýta klæði?

Finn upp á nøkur hugskot til, hvat kundi verið gjørt við brúkt klæði.

Skrivið trý tey bestu hugskotini á ein pappírslepa.

Aftaná kunnu tit tosa saman um tað í flokkinum og hoyra, hvørji onnur hugskot floksfelagarnir hava.

### VISTI TÚ

- Stórar nøgdir av týningarevnum og handils-tøðum verða nýtt til at dyrka handils-tøðum.
- Nógv vatn krevst eisini til at dyrka bummull
- Tað er eitrandi fyri arbeiðararnar at heinta sproytað bummull, um ikki teir verja seg við maskum og handskum.

# NÝTSLA OG ENDURNÝTSLA




## VISTI TÚ

> Eitt endurnýtt plagg krevur lítið ella einki nýtt tilfeingi.
> At gera eina T-shirt, sum vigar 300 gramm, krevur 3 kg av rávørum og 1400 litrar av vatni, sum er tað sama, sum rúmast í 10 fullum baðikørum.

## VISTI TÚ

Størsta orkunýtslan í livitíðini hjá eini T-shirt er tann orkan, ið brúkt verður til vask og turkitrumling, eftir at hon er seld.

## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

> At keypa brúkt klæði minkar um burturkast og sparir tilfeingi.
> Heldur enn at tveita klæði í ruskspannina kanst tú ofta bøta tey, lata tey til endurnýtslu, endurvinning ella selja tey á loppumarknaði.

# UPPGÁVA 5

## FINN UPP Á EINA VERKÆTLAN

### INNGANGUR

Møguliga hava foreldur tíni ella tú tveitt nógv klæði burtur, sum tú ikki passar ella ikki vilt brúka longur. Hevur tú hugsað um, at klæðini kunnu verða nýtt til okkurt annað ella til at gleða onkran annan?

### VERKEVNI

Finn saman við floksfeløgunum upp á eitt verkevni ella eina verkætlan, har tit kunnu leingja livitíðina hjá klæðum, so at onnur fáa gagn av teimum, heldur enn at tey enda sum burturkast.

Hvussu kunnu tit endurnýta klæðini heldur enn at blaka tey burtur?

Tit kunnu møguliga finna ein hátt at læna ella skifta um klæði?

Kanska kunnu tit seyma klæðini um til okkurt nýtt og smart?
Ella tit kunnu selja tey á loppumarknaði?

Tá ið tit eru samd um, hvat tit kundu hugsað tykkum at gera, er spurningurin, hvussu tit gera tað.

> Hvar ætla tit at gera tað?
> Hvør skal vera við?
> Hvussu fara tit at gera tað?
> Hvørjum tilfari ella hjálpitólum hava tit møguliga tørv á?

Tá ið tit eru komin ásamt um, hvat tit kundu hugsað tykkum at gera, kunnu tit velja ein úr bólkinum at leggja hugskotið fram fyri flokkin. Aftaná avgera tit:

> Hvussu nógva tíð tit skulu brúka (frá byrjan til enda)?
> Hvør hevur ábyrgdina av hvørjum uppgávum?
> Hvussu fáa tit hjálpt hvør øðrum?

Minnist til at skriva alt upp ella tekna tað, so at tit ikki gloyma, hvat tit hava avtalað.

Tá ið verkætlanin er liðug, kunnu tit greiða hvørjum øðrum í flokkinum frá, hvussu gekst. Tit siga frá, hvat gekk væl, og hvat minni væl. Tit kunnu eisini tosa um, hvat tit høvdu gjørt øðrvísi eina aðru ferð. Kanska tit eisini greiða frá, hvat tit hava lært.

## EITT ’KLÆDNABÓKASAVN’

”Eg havi hoyrt um ein sera kulan skúlaflokk í Týsklandi, sum hevur verið kreativur og funnið upp á sína egnu verkætlan. Nakrir næmingar hildu tað vera ordiliga keðiligt, at tey ikki fingu nýggj klæðir frá foreldrunum, tá ið tey gjarna vildu, ella um onkur av hinum í flokkinum hevði fingið okkurt smart, sum tey eisini vildu hava.

So funnu tey uppá, at tey kundu læna klæðir frá hvørjum øðrum.

Og tað vóru so nógv í skúlanum, sum eisini vóru við upp á hetta, at tey gjørdu eitt ’klædnabókasavn’, líka sum vit hava til bøkur, bara til klæðir í staðin. So sluppu tey frá at biðja foreldrini um at fáa nýggj klæðir alla tíðina, tey kundu bara læna frá klædnabókasavninum. Er tað ikki snilt? Eg haldi, tey gjørdu lánarakort, so at tey kundu halda skil á, hvør lænti hvat og í hvussu langa tíð.”

***Sigvør***

***Jónas***

## KLÆDNABÝTISDAGUR

”Eg havi hoyrt, at nøkur hava hildið ein stóran klædnabýtisdag í flokkinum. Næmingarnir í 6. flokki tóku klæðir við, sum tey ikki brúktu longur, so at tey kundu skifta um við onkran annan.

Har var til dømis ein drongur, sum hevði fingið nýggja fótbóltsblusu og gaggur, sum ein annar drongur var vaksin úr, í býti fyri tey grønu regnklæðini, sum hann ikki tímdi at brúka longur.
Tað var altso snilt.”

**DØMI**

## GEV VINFÓLKUM KLÆÐINI - ELLA ONKRUM VÆLGERANDI FELAGSSKAPI

"Vit kunnu eisini bara geva onkrum vinfólkum ella familju klæðini, sum vit ikki vilja brúka longur, so at vit ikki bara blaka tey í ruskspannina. So eru tað onnur, sum verða glað fyri tey, og klæðini kunnu brúkast longur.

Er eingin, sum vil hava tey, ber tað eisini til at geva einum vælgerandi felagsskapi tey, tað sigur mamma. Vit hava einaferð fylt nakrar posar við klæðum heima og lagt teir í eina av hasum bingjunum við einum reyðum krossi á.

Vita tit, hvat verður gjørt við klæðini, tá ið vit hava lagt tey í bingjuna?"

*Steinbjørn*

## GER EIN KLÆDNALOPPUMARKNAÐ

"Eg havi eitt annað ordiliga gott hugskot. Vit kunnu tjena pengar í staðin fyri at blaka klæðini burtur, um vit gera ein klædnaloppumarknað.

Vit kundu gjørt nakrar búðir, antin á skúlanum ella aðrastaðni, ella vit kundu selt tey á netinum.

Eg veit onkur støð, har fólk leggja eina mynd inn av klæðunum, tey vilja selja, - og so eru ordiliga nógv, sum síggja tað, og ikki bara í okkara býi."

*Jóhan*

*Maria*

## NÝTT SNIÐ

"Eg haldi, eg havi eitt frálíkt hugskot um, hvussu vit kunnu brúka tey klæðini, vit ikki tíma at brúka longur.

Um vit nú øll somul taka klæði við, vit ikki hava brúk fyri longur, og seyma tey um til okkurt nýtt?

Vit kunnu kanska gera tað í handarbeiðstímunum, tí so kunnu vit brúka seymimaskinurnar, og so kunnu vit skapa okkara heilt egnu klæði; hevði tað ikki verið stuttligt?"

# MATUR

**UPPGÁVA 6**

**UPPGÁVA 7**

# UPPGÁVA 6

## HVÍ TVEITA VIT MAT BURTUR?

### INNGANGUR

Tú hevur óivað onkuntíð fingið tær meira á tallerkin, enn tú orkar at eta. Tú hevur møguliga eisini varnast, at mjólkin í køliskápinum kann vera ov gomul. Men hevur tú hugsað um, hvat tað kostar at keypa tann matin, sum endar í ruskspannini?

### VERKEVNI

Royn at viga matoyðslið, tit hava heima hjá tykkum, og brúka talvuna á síðu 31 til at rokna prísir og $CO_2$-útlát av tykkara matoyðsli. Eftir at tit hava gjørt mátingar í eina viku, kunnu tit samanbera tølini við hini.

Rokna út eftir eina viku, hvussu nógvan pening tit hava tveitt burtur í mati heima.

Rokna út eftir eina viku, hvussu nógv $CO_2$ tit kundu spart við at etið matin heldur enn at tveitt hann burtur.

Samanberið við hvønn annan, hvat verður mest blakað burtur.

Hvørjar orsakir eru til matoyðsl heima hjá tykkum?

Hvussu kann sleppast undan matoyðsli?

Hvat annað enn sjálvan matin tveita vit burtur?

Hvat vænta tit í framtíðini: Veksur ella minkar matoyðslið í Føroyum?

## VISTI TÚ

> Sera nógv vatn fer til at framleiða matvørur.
> 15.000 litrar av vatni fara til at framleiða 1 kg av neytakjøti.
> Umleið 140 litrar av vatni fara til at framleiða ein kopp av kaffi.

## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

Vit kunnu altíð lukta, smakka og kenna á matinum, um hann er etandi ella ikki.

## DØMI UM MATOYÐSL

- At fáa sær meir á tallerkin, enn vit orka at eta.
- At blaka matleivdir burtur heldur enn at goyma tær í køliskápi/frystara.
- At keypa ov nógv inn, so at vit ikki náa at eta alt, áðrenn tað spillist.
- At blaka matin burtur fleiri dagar fyri seinasta nýtsludag.
- At gloyma at brúka allan matin í køliskápinum, áðrenn vit keypa nýggjan.
- At blaka skálkarnar á breyðinum burtur.
- At tveita uttastu salatbløðini burtur, hóast einki er galið við teimum.
- At stoyta leivdir av mjólk ella djúsi burtur, hóast tær ikki eru spiltar.
- At blaka rukkut súrepli burtur.
- At tveita endaflísina á agurkuni burtur.
- At flysa nýggj epli.
- At hava ov nógvan ásettan mat í senn.
- At gloyma at hava matætlanir fyri fleiri dagar í senn.
- At gloyma at brúka matleivdirnar til t.d. matpakkar.
- At keypa ov nógv í senn.
- At gloyma at eta upp úr frystaranum, áðrenn nýtt verður keypt í hann.
- At gera ov nógvan mat til, sum vit ikki klára at eta upp.
- At gloyma at frysta matin í passaligum nøgdum.
- At skera grøna toppin á nógvum grønmeti burtur, sum annars kundi verið nýttur til suppur, pesto ella í salat.

Stop spild af mad, 2018
www.stopspildafmad.dk/madspild

## VISTI TÚ

- At skaffa neytakjøt ávirkar veðurlagið 25-50 ferðir meiri enn at dyrka epli, gularøtur, mais og havra.
- 30-40% av øllum mati í verðini, verður ongantíð etin, men fer til spillis ella verður oyðslaður burtur.
- Ein familja við tveimum vaksnum og tveimun børnum tveitir mat burtur fyri umleið 10.000 kr um árið í miðal. Tað er 20% av samlaðu útreiðslunum til mat um árið.



# UPPGÁVA 7

## HVUSSU NÓGVUR MATUR VERÐUR TVEITTUR BURTUR Í MATVØRUHANDLINUM?

### INNGANGUR

Hevur tú givið tær far um, hvussu nógvur matur fer til spillis hvønn dag, tí at matvøruhandilin ikki klárar at selja hann áðrenn seinasta nýtsludag? Kanska hevur tú roynt at velja tær bestu fruktirnar í matvøruhandlinum ella sæð foreldur tíni taka tann pakkan av kjøti, sum kundi halda sær longst, hóast tað bleiv brúkt sama dag.

Saman við floksfeløgunum kanst tú kanna, hvussu nógvur matur verður blakaður burtur í matvøruhandlinum og hví. Er nakar brúnur blettur á fruktini, er farið um seinasta søludag, ella er ein onnur orsøk til, at maturin ikki er seldur?

### VERKEVNI

Vitja ein matvøruhandil og tosa við tey um matoyðsl.

**ÁÐRENN tit vitja matvøruhandilin**

Gerið í bólkum ein lista við teimum matvørum, ið eftir tykkara meting serliga fara til spillis í einum matvøruhandli, og ein við teimum matvørum, ið ikki fara eins nógv til spillis.

Hvussu vita vit, at okkurt ikki longur er gott at keypa í einum matvøruhandli?

Er tað gott ella ringt?

Ger nakrar spurningar, sum eru hentir at fáa svar uppá, tá ið tit fara at vitja matvøruhandilin.

Tað kann vera:
Hvussu kann matvøruhandilin gerast dugnaligari til at selja vørur, ið eru nær við seinasta søludag, so at tað slepst undan at blaka tær burtur?

Kann handilin møguliga samstarva við brúkaran um tað? (Tit hava óivað eisini annað at spyrja um enn tað, ið hevur við matoyðsl at gera; so skrivið eisini teir spurningarnar upp.)

Fyrireikið eisini annað, ið tit sjálv fegin vilja kanna, nú tit fara á vitjan.

Hvør í bólkinum skal gera tað? Og hvussu fáa tit skrivað tað upp, sum tit koma fram til.

**MEÐAN tit vitja í matvøruhandlinum**

Minnið hvør annan í bólkinum á, hvat tit hava avtalað, og hvør skal gera hvat.

Skrivið eisini annað upp, sum tit ikki høvdu fyrireikað, um tað er gott at vita.

Hugsið eisini um, um okkurt kundi verið gott at greitt familjuni frá heima hjá tykkum.

Hava tit nøkur hugskot til, hvat matvøruhandilin kann gera fyri at minka um burturkastið av mati?

**EFTIR vitjanina í matvøruhandlinum**
Fáið nú skil á svarunum til tykkara spurningar. Hvat hava tit fingið at vita?

Tosið í flokkinum um, hvussu stóran tit halda trupulleikan vera, at handlar tveita mat burtur.

Hvussu man vera í øðrum handlum, sum selja mat?

Hava tit nøkur hugskot til, hvat tit kunnu gera, so at minni av mati verður tveittur burtur? Summir handlar selja bara mat í blikki, fløsku ella turran mat sum t.d. mjøl.

> Hvørjar fyrimunir hava hesir handlar av bert at selja slíkar vørur?
> Hvørjar vansar hevur hetta fyri handilin?
> Hvørjir fyrimunir kunnu vera fyri brúkararnar?
> Hvørjir vansar kunnu vera fyri brúkararnar?

Tá ið tit vita, hvat tað er fyri matur, ið endar í ruskspannunum í matvøruhandlinum, kunnu tit tosa um, hvat kundi verið gjørt fyri, at matvøruhandilin ikki noyddist at tveita so nógvan mat burtur. Um fólk ikki kunnu eta matin, kunnu djór kanska eta hann? Hvussu fáa vit fólk at keypa tær matvørur, sum eru tættast við 'Best fyri:'-dagfestingina?

Fyri at øll onnur eisini kunnu skilja tykkara loysn til at minka um matoyðslið í matvøruhandlinum, er eitt gott hugskot at gera eina snotiliga plakat ella veggjarmynd, ið lýsir tykkara loysn.




**$CO_2$-málarin** vísir, hvussu nógv kg av $CO_2$-eindum (vakstrarhúsgassi, so sum $CO_2$, $CH_4$ og $N_2O$) verða útleidd, tá ið ymsar matvørur verða framleiddar. Neytakjøt er ovast, tí har verður mest av vakstrarhúsgassum útleitt, og donsk frukt er niðast, tí har verður minst av vakstrarhúsgassum útleitt.

## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

Vit eta bæði frukt, grønmeti og kjøt. Stórur munur er tó á, hvussu nógv burturkast stendst av framleiðsluni.

| Matvøra | Kiloprísur umleið |
|---|---|
| Neytakjøt (malið) | 75 kr. |
| Lambsryggur | 110 kr. |
| Ostur | 90 kr. |
| Frystar rækjur | 145 kr. |
| Rís | 23 kr. |
| Grønmeti úr vakstrarhúsi: | |
| > Tomat | 30 kr. |
| > Agurka | 33 kr. |
| > Piparfrukt | 40 kr. |
| Svínakjøt | 70 kr. |
| Høsnarungabringa | 115 kr. |
| Laksaflak | 160 kr. |
| Egg | 33 kr. |
| Mjólk | 11kr. |
| Rugbreyð | 25 kr. |
| Pasta | 34 kr. |

## VISTI TÚ

Matvøruhandlarnir blaka viðhvørt ein heilan kassa av tomatum burtur, tí ein er spilt, ella tí pakkitilfarið er illa farið og ikki sær vakurt út longur.

## HEVUR TÚ HUGSAÐ UM

At ein av orsøkunum til matoyðsl í matvøruhandlum er, at vit keypa inn á óhepnan hátt. Vit taka snøggastu fruktirnar og velja tær vørur burturúr, ið halda sær longst.

## TALVA TIL AT SKRÁSETA MATOYÐSL

Her kanst tú skráseta, hvørji sløg av mati eru burturbeind, hví maturin er burturbeindur og hvussu mong kg tað snýr seg um. Við hesi talvu kunnu tit eisini rokna út, hvat virði matoyðslið hevur í krónum og oyrum, og hvussu stórt $CO_2$-útlát framleiðslan voldi.

| Matvøra | Orsøk til at maturin er burturbeindur | Vekt í kg | Prísur í kr | $CO_2$ |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

# ELEKTRONIKKUR

**UPPGÁVA 8**

**UPPGÁVA 9**

# UPPGÁVA 8

## Kannið, hvat tilfar verður brúkt til elektronikk, og hvat verður gjørt við tað eftir brúk

**INNGANGUR**

Tá ið elektronikkur verður framleiddur, verða mong ymisk evni nýtt – ofta meira enn 100 ymisk. Framleiðslan av elektronikki er torfør, og sera nógv ymiskt tilfar og orka verða brúkt til framleiðsluna.

Umleið 75 kg av tilfari verða brúkt til at gera eina fartelefon. Nógv tann størsti parturin av hesum tilfari verður bara brúktur í framleiðsluni av telefonini og er tí ikki í teirri lidnu telefonini. Annars hevði hon jú eisini verið sera tung!

Tá ið rávørurnar verða umgjørdar til tað tilfar, ið vit skulu brúka, verður nógv orka nýtt. Orkan verður nýtt til maskinur, bræðing og til flutning av ymsu lutunum.

**VERKEVNI**

Kannið, hvat tilfar vanliga er í elektronikki, og skrivið tað á ein pappírslepa. Tit kunnu byrja við at hyggja at tykkara fartelefonum í flokkinum.

Kanska síggja tit skjótt, um meiri enn helvtin av eini fartelefon er gjørd úr plasti.

Hvat annað tilfar man vera í eini fartelefon?

Sum hjálp kunnu tit hyggja at myndini á næstu síðu, har sæst, hvat tilfar vanliga verður brúkt í elektronikki. Kanska kenna tit okkurt av tí.

Hvat skal verða gjørt við burturkast frá elektronikki? Finnið útav, hvat tilfar kann verða endurnýtt ella endurvunnið.

Tosið við floksfelagarnar um, hvørji ráevni verða nýtt til at framleiða ymsu sløgini av tilfari.




## VISTI TÚ

Nøkur av metalunum, sum kunnu vera í eini fartelefon, eru: jarn, kopar, aluminium, tin, sink, blýggj, nikkul, gull, silvur og platin.

Battarí hava í sær metal, sum liggja í eini vætu inni í battaríunum. Tað eru metalini, sum gera, at battaríið framleiðir streym.

Tað er lætt at skilja ymsu metalini sundur og endurnýta tey.

Fyrr tveittu vit battarí í vanliga ruskílatið. Nú koyra vit gomul battarí í posan til serliga dálkandi burturkast, ella vit lata tey aftur til handilin.

## UPPLÝSINGAR UM RÁVØRUR Í ELEKTRONIKKI

| Tilfeingi/evni | Rávørur/orka | Eginleikar | Umhvørvi/endurnýtsla |
|---|---|---|---|
| **Plast** | Plast verður gjørt úr olju. Umleið 2 kg av olju verða brúkt til at gera 1 kg av plasti. | Mong ymisk sløg av plasti eru. Ymiskt er, hvat tey verða nýtt til. Til ber at siga, at plast er ein stór familja úr túsund ymsum sløgum av tilfari. Øll við hvør sínum eginleikum. | Til ber at endurnýta plast, um tað er reint. Tað merkir, at ongar leivdir av mati, sápu ella eitri eru á tí.<br><br>Um plast skal verða endurnýtt, mugu ymsu sløgini av plasti verða sundurskild. |
| **Keramikk** | Keramikk er evnað til úr leiri og síðani brent í keramikk-ovni. | Leir er ikki vatntætt, og tí verða lutirnir ofta glaraðir, so at teir verða vatntættir. | Til ber ikki at bræða og endurvinna keramikk. Tó ber til at endurnýta knúst keramikk í til dømis byggi- og nýgerðaverkætlanum. |
| **Glas** | Glas verður gjørt úr sandi o.ø. | Glas kann verða nýtt til nógv ymiskt, tí tað er vatntætt og gjøgnumskygt. Men tað brotnar lætt. | Glas kann verða endurnýtt aftur og aftur. |
| **Tungmetal** | Tungmetal verða fingin úr námum ymsastaðni í heiminum. | Metal verður rópt tungmetal, um tað 'vigar' meiri ella rættari, hevur størri evnisnøgd enn jarn. Tungmetal er m.a. kad-mium, blýggj, krom, kopar og kyksilvur. | Tungmetal eru skaðilig fyri bæði náttúru og menniskju. Tað er skaðiligt at hava ov stórar nøgdir av tungmetali í kroppinum. |
| **Dýr metal** | Dýr metal verða fing-in úr námum ymsa-staðni í heiminum. | Silvur, gull og platin eru dýr metal. Hesi leiða væl streym. Tí verða tey brúkt í elektronikki, har nógvir leidningar eru. Nógv av gulli verður brúkt í elektro-nikki. Tað verður lagt sum tunt lag oman á annað bíligt metal. | Bæði gull, silvur og platin kunnu verða endurnýtt. Elektronikkur kann verða sundurskildur, og metalini kunnu verða endurnýtt. Á henda hátt verða bæði metal, vatn og orka spard. Og tí verður heldur ikki tørvur á so mongum nýggjum námum, ið lættliga oyði-leggja landslagið. |

| Tilfeingi/evni | Rávørur/orka | Eginleikar | Umhvørvi/endurnýtsla |
|---|---|---|---|
| **Kopar** | Kopar verður fingið burtur úr námum. | Kopar er reydligt metal. Kopar leiðir væl hita og streym og verður ofta brúkt í leidningum. | Kopar kann verða brætt upp aftur og verða endurnýtt. Á leið 1/3 av nýtsluni er endurnýtslukopar. 60-90% minni av orku verður brúkt við at endurnýta kopar heldur enn at taka nýtt kopar úr náttúruni. |
| **Aluminium** | Aluminium verður útvunnið úr jørðini. Tá ið aluminium verður skilt frá øðrum evnum í jørðini, verður nógvur streymur brúktur, eins og nógv burturkast kemur burturúr. | Aluminium er silvurhvítt metal. Eftir jarn er aluminium mest brúkta metalið. Aluminium rustar ikki. | Tá ið eitt kg av nýggjum aluminiumi verður framleitt, verða 85 kg av burturkasti eisini framleidd. Endurnýtslu-aluminium hinvegin framleiðir bert 3,5 kg av burturkasti. So her ber til at spara nógv. |
| **Jarn** | Mesta jarnið verður fingið úr námum undir jørð. | Lætt er at skilja jarn frá øðrum evnum, tí jarn er magnetiskt. | Jarn kann verða endurnýtt, um tað verður skilt rætt. Um vit endurnýta jarn og stál, spara vit meiri enn helvtina av teirri orku, vit høvdu brúkt, um jarnið varð tikið úr náttúruni. |
| **Flammutálmarar** | Til eru umleið 40 ymisk evni, ið verða brúkt til at forða fyri, at nakað kann brenna. Tey verða rópt bromeraðir flammutálmarar. | Bromeraðir flammutálmarar verða latnir í plast til elektronikk at forða fyri, at eldur kemur í tað. Til ber eisini at geva eini toysofu bromeraðar flammutálmarar, so at ikki lættliga festir í hana, um eldur kyknar. | Summir bromeraðir flammutálmarar kunnu hópast upp í náttúruni og verða skaðiligir fyri menniskju og umhvørvi. |

# UPPGÁVA 9

## HVUSSU KUNNU VIT MINKA UM BURTURKAST, TÁ IÐ VIT BRÚKA ELEKTRONIKK?

### INNGANGUR

Elektronisk tól nýta streym, tá ið tey verða brúkt. Men tey kunnu eisini nýta streym, hóast tey eru 'sløkt' (stand-by nýtsla). Summi tól seta vit til stikkkontaktina, og onnur fáa streym frá battaríum.

Vit nýta battarí til nógvar lutir. Til dømis til telefonir, lyktir, myndatól, leikur og lummaroknarar. Um vit ikki nýta battarí, sum kunnu løðast, eru battarí burturkast, tá ið tey eru avlødd (eingin orka er eftir). Hóast tað ofta ikki sæst, kunnu smá battarí vera til dømis í armbandsurum, postkortum við tónleiki, sokkum við ljóði, skóm ella hárboylum við ljósi, dukkum, bamsum og øðrum leikum við ljósi ella ljóði.

### VERKEVNI

Kanna elektronikk heima.

Ger ein lista við tí, tit hava av elektroniskum lutum heima.

### VISTI TÚ

Sum nú er, fara mong evni fyri skeytið, tí vit ikki handfara burturkastið á rættan hátt.

Til dømis er meiri av gulli á einum ruskplássi enn í einum gullnámi.

Í bara fýra fartelefonum er nóg mikið av silvuri til ein fingurring.

### VISTI TÚ

Nógv er at spara, um tú kanst brúka somu elektronisku útgerð leingi. Hvørja ferð ein fartelefon á 120 gram verður framleidd, hevur hon elvt til umleið 75 kg av burturkasti, áðrenn hon liggur í lummanum hjá tær. Hesum burturkastinum sleppur tú undan, hvørja ferð tú letur vera við at keypa eina nýggja fartelefon.

Hvønn lut hevði tú best kunnað verið fyri uttan, um tú ikki slapst at nýta eins nógvan streym heima sum nú?

Hvussu nógvur elektronikkur er vanligur at hava í einum heimi?

Hvussu vænta tit, at gongdin fer at verða í framtíðini? Fara at verða fleiri lutir heima, ið nýta streym?

Eru battarí, sum kunnu løðast, ein góð loysn?

Burturkast stendst av at framleiða elektronikk, tá ið hann verður sendur runt í verðini, verður brúktur og sjálvandi eisini, tá ið hann verður burturbeindur. Hvussu ofta fáa tit nýggjan elektroniskan lut heima? Og hvussu er tað í mun til hjá hinum í flokkinum?

Hvør er tykkara hugsan í flokkinum um, hvat vit kunnu gera til at fáa so lítið av burturkasti frá elektronikki sum gjørligt?

Hvat eiga vit at gera við elektroniska útgerð, tá ið hon er uppbrúkt ella slitin og skal tveitast burtur?

Hvussu kunnu vit leingja livitíðina hjá elektronikki?




Leiðin til minni rusk
Næmingahefti

ISBN 978-92-893-4005-2 (PRINT)
ISBN 978-92-893-4006-9 (PDF)
http://dx.doi.org/10.6027/US2015-406
US 2015:406

© Norðurlendska ráðharraráðið 2015

Ritstjórn: Tomas Sander Poulsen og Anja Charlotte Gylling, PlanMiljø og Søren Breiting, DPU.
Uppseting: Koch&Falk (DesignKonsortiet)
Myndagerð: Mette Falk
Ráðgeving og kontakt í Føroyum: NÁM
Týðing: Sigrið Højsted
Tillaging: Umhvørvisstovan
Skrift: Meta

Hetta tilfar er givið út við fíggjarligum stuðli frá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Innihaldið endurspeglar tó ikki neyðturviliga sjónarmið, hugburð ella tilmæli Norðurlendska Ráðharraráðsins.

NORDISK MILJØMÆRKNING

www.norden.org/nordpub

Norðurlendska samstarvið
Norðurlendska samstarvið er eitt av heimsins víðfevndastu landspartasamstørvum. Samstarvið fevnir um Danmark, Finnland, Ísland, Noreg, Svøríki, Føroyar, Grønland og Áland.

Norðurlendska samstarvið er bæði politiskt, fíggjarliga og mentanarliga grundfest og er ein týðandi liður í evropiska og altjóða samstarvinum. Norðurlendski felagsskapurin arbeiðir fyri sterkum Norðurlondum í einum sterkum Evropa.

Norðurlendska samstarvið vil arbeiða fyri at styrkja norðurlendsk og landsparta áhugamál og virði í einum altjóða umheimi. Felags virði landanna millum eru við til at styrkja støðu Norðurlanda sum eitt av heimsins mest nýskapandi og kappingarføru økjum.

Nordiska ministerrådet
Ved Stranden 18
1061 København K
Telefon (+45) 3396 0200

www.norden.org

norden

Nordisk Ministerråd

Ved Stranden 18
1061 København K
Telefon (+45) 3396 0200

www.norden.org

US 2015:406
ISBN 978-92-893-4005-2 (PRINT)
ISBN 978-92-893-4006-9 (PDF)

